FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Argir, 29. februar 2012

J.Nr.: 050000-002/12-18

Viðgjørt: PAL

Løgtingið

Løgtingsmál nr. 184/2011: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (innkrevjing av mvg-skuld)

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald
(innkrevjing av mvg-skuld)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 34 frá 30. apríl 2011, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í §§ 5, stk. 5, og 20, stk. 3 verður "§ 23 a, stk. 8" broytt til: "§ 23 b, stk. 2".

2) Í § 21, stk. 3 verður: "út frá einari meting" strikað.

3) Í § 21 verður sum stk. 4 sett:
"*Stk.* 4. Um so er, at eitt virki í 4 fylgjandi avgjaldstíðarskeið hevur fingið avgjald ásett sbrt. stk. 3, kann TAKS taka skrásetingina frá virkinum, um so er, at virkið ikki letur inn fullfíggjaðar uppgerðir. Áðrenn skráseting verður tikin frá virkinum, skulu virkið og leiðsla við innskrivaðum brævi hava fráboðan um, at um virkið ikki letur inn manglandi uppgerðir innan 14 dagar, verður skrásetingin tikin frá virkinum. Í fráboðanini skal verða sagt frá, at um virkið rekur meirvirðisgjaldskyldugt virksemi aftaná, at meirvirðisgjaldskrásetingin er tikin frá virkinum, er hetta revsivert sbrt. § 33, stk. 3, og at leiðslan heftir fyri hetta avgjald sbrt. § 23 b, stk. 11."

4) Í § 23 a, stk. 4 verður "smb. § 29" broytt til: "sbrt. § 13, stk. 3 og 4".

5) § 23 a, stk. 5 verður orðað soleiðis:
"Stk.5. Virkir kunnu í staðin fyri at nýta stytt avgjaldstíðarskeið o.a. sbrt. stk. 1 og 4 velja at seta trygd sbrt. § 23 b, stk. 1 og 2."

6) § 23 a, stk. 7 verður orðað soleiðis:
"Stk. 7. Virkir, ið seta kravdu trygdina, skulu ikki, hóast stk. 1 og 4, nýta stytt avgjaldstíðarskeið o.a."
Stk. 8 og 9 verða strikað.

7) Aftan á § 23 a verður sett:
"**§ 23 b.** TAKS kann áleggja einum virki at seta trygd, tá
1) virkið ikki heldur krøvini um stytt avgjaldstíðarskeið, ella

2) virkið 3 ferðir innan fyri teir seinastu 12 mánaðirnar ikki rættstundis hevur rindað avgjald, og
3) virkið er í eftirstøðu við avgjaldinum eftir hesi løgtingslóg við eini upphædd, ið er meira enn 25.000 kr. tilsamans, og
4) virkið ikki rindar eftirstøðuna eftir nr. 2 ella 3 áðrenn 10 yrkadagar frá tí, at áminningarskriv frá TAKS er móttikið, har virkið verður kunnað um, at um tað framvegis ikki rindar eftirstøðuna, verður álagt virkinum at seta trygd.
Stk. 2. TAKS kann harumframt áleggja virkjum, ið verða fráboðað til skrásetingar, og verandi virkjum at seta trygd, tá ið eigari av virkinum innan fyri tey seinastu 5 árini hevur verið eigari av ella limur í nevnd ella stjórn í øðrum skrásettum virki, ið er farið konkurs ella er vorðið insolvent, og har TAKS hevur krøv, ið ikki eru nóg væl tryggjað, ella landskassin hevur havt 50.000 kr. ella meira tilsamans í tapi av avgjaldi eftir hesi løgtingslóg. 1. pkt. er eisini galdandi, tá tann persónur, ið veruliga rekur virkið, hevur tilknýti til eigara, lim í nevndini ávíkavist stjórnini á sama hátt, sum ásett í § 210, stk. 1, 3. pkt. í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg.
Stk. 3. Trygd, sbrt. stk. 2, skal tó bert setast, tá tað eftir eini ítøkiligari metan verður mett at vera stórur váði fyri, at kravið um stytt avgjaldstíðarskeið o.a. eftir § 23 a, stk. 1 ella 4 ikki er nóg mikið til at tryggja, at avgjald eftir hesi løgtingslóg verður goldið rættstundis.
Stk. 4. Trygd eftir stk. 1 og 2 skal setast fyri eini upphædd, ið samsvarar við eftirstøðuna í avgjaldinum eftir hesi løgtingslóg, umframt væntað meðal avgjald fyri eitt 3 mánaða skeið. Snýr tað seg um virki, ið verður fráboðað til skrásetingar, skal trygd setast fyri eini upphædd, ið eftir meting frá TAKS, samsvarar við tað væntaða miðalavgjaldið í einum 3 mánaða tíðarskeiði.
Stk. 5. Trygd eftir stk. 1 og 2 skal setast seinast 8 dagar aftaná, at virkið hevur móttikið fráboðan um hetta, tó so at freistin kann leingjast eftir áheitan. Fráboðan um trygd verður send virkinum við innskrivaðum brævi.
Stk. 6. Í fráboðanini við kravi um trygd til verandi virkir og teirra leiðslu skal verða sagt frá, at um nevnda trygd ikki verður sett, verður skrásetingin strikað, og at framhald av meirvirðisgjaldskylduga virkseminum aftaná, at skrásetingin er strikað, er revsiverd eftir § 33, stk. 3, og at leiðslan heftir persónliga fyri avgjaldinum sbrt. stk. 10.
Stk. 7. Krav um trygd til virkir og leiðslu, ið verða fráboðað til skrásetingar, skal setast virki og leiðslu seinast 14 dagar aftaná, at TAKS hevur móttikið skrásetingarskjalið. Kravið um trygd skal innihalda upplýsing um:
1) at verður trygd ikki sett, kann virkið ikki skrásetast,
2) at framhald av virkinum er revsivert eftir § 33, stk. 3, og
3) at leiðslan heftir persónliga fyri avgjaldinum sbrt. stk. 10.

Stk. 8. Verður trygd ikki sett rættstundis av verandi virki, verður skrásetingin tikin frá virkinum. Verður trygd ikki sett av virki, ið er fráboðað til skrásetingar, verður virkið ikki skrásett.
Stk. 9. Fráboðan um, at skráseting er tikin aftur ella noktað sbrt. stk. 8, verður send virki og leiðslu við innskrivaðum brævi, og samstundis verður sagt frá, at framhald av virkinum aftaná, at skráseting er tikin aftur ella noktað, er revsivert sambært ásetingini í § 33, stk. 3, og at leiðslan heftir persónliga fyri avgjaldinum sambært stk. 10.
Stk. 10. Leiðslan í einum virki, sum við vilja ella av grovum ósketni heldur áfram ella byrjar rakstur av einum virki, hóast skrásetingin er tikin aftur ella noktað, sbr. stk. 8, heftir persónliga fyri avgjaldinum, sum stendst av tí ikki skrásetta virkinum. Leiðslan heftir persónliga, óavmarkað og solidariskt.
Stk. 11. Trygd, ið er sett sbrt. stk. 1 og 2, heldur uppat, tá ið virkið í seinasta 12 mánaða tíðarskeiði hevur goldið avgjald, og virkið ikki longur er í eftirstøðu av avgjaldi eftir hesi løgtingslóg."

8) Í § 26 verður sum stk. 3 sett:
"*Stk. 3.* Heimilað verður TAKS at innkrevja skuld og innkrevjingarkostnað sambært hesi løgtingslóg við at afturhalda í A-inntøku hjá teimum gjaldskyldugu sambært reglunum um hetta í Skattalógini."

9) § 33, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Tann, sum fremur eitt av nevndu brotum við vilja ella av grovum ósketni fyri at fáa avgjald útgoldið úr landskassanum sambært § 24 ella fyri sleppa sær undan at rinda avgjald, verður revsaður við bót, hefti ella fongsli upp til 2 ár. Við bót, hefti ella fongsli upp til 2 ár revsast eisini tann, ið við vilja ella av grovum ósketni rekur skrásetingarskyldugt virksemi, hóast virkinum er noktað skráseting, ella skráseting er tikin aftur eftir ásetingunum í §§ 21, stk. 4, og 23 b, stk. 9."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum mælir við hesum til at gera broytingar í løgtingslógini um meirvirðisgjald. Endamálið við lógarbroytingunum er at minka um eftirstøður og tap fyri landskassan av meirvirðisgjaldi og forða fyri at vinnuliga kappingin verður avlagað samstundis, sum rættarkenslan hjá borgarunum verður styrkt.

Tað er fatanin hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum, at meginparturin av teimum meirvirðisgjaldsskyldugu geva rætt upp og gjalda meirvirðisgjaldið til tíðina, men landsstýrismaðurin og Fíggjarmálaráðið fáa til tíðir ábendingar um, at tað eru fyritøkur og persónar, ið misbrúka meirvirðisgjaldsskipanina. Hetta er sera óheppið, bæði tí at landskassin missir pening og tí at kappingin millum fyritøkurnar verður avlagað. Fyritøkur klaga um, at tað kann ikki betala seg at bjóða uppá uppgávur, tí tær eru upp ímóti fyritøkum, ið sleppa sær undan at gjalda mvg, og tí kunnu geva lægri boð.

Vart skal verða gjørt við, at endamálið við hesum broytingaruppskoti til mvg-lógina er ikki at raka persónar, ið ikki hava fingið gjørt sína skyldu móti landskassanum, orsakað av óhepnum umstøðum, men harafturímóti persónar, ið tilvitað misbrúka mvg-skipanina.

Striking av skráseting:

Mælt verður til, at TAKS fær heimild at strika skráseting av virki (tvingsilsfrámelda), um so er, at virkið í 4 fylgjandi avgjaldstíðarskeið ikki hevur latið inn meirvirðisgjaldsuppgerð. Grundgevingin fyri hesum er, at hvørki vinnulív ella samfelagið hava áhuga í, at nøkur virki ikki fylgja ásettum reglum um avrokning av meirvirðisgjaldinum. Tað avskeplar kappingina til stóran bága fyri tey virki, sum avrokna rættstundis. Harumframt kann manglandi innlating og gjald av avgjaldinum verða eina ábending um, at hesi virki ikki halda aðrar ásetingar í meirvirðisgjaldslógini.

Reglur um trygd:

Í núverandi meirvirðisgjaldsslóg er heimilað at krevja, at virki í samband við skráseting skal seta trygd, um so er, at eigari, stjóri ella nevndarlimur hevur innanfyri tey seinastu 5 árini verið eigari, stjóri ella nevndarlimur í virki, ið er farið konkurs ella vorðið insolvent, og har landskassin hevur havt tap upp á 50.000 kr. ella meir.

Skotið verður upp at víðka heimildina at krevja trygd til eisini at fevna um verandi virki. Hetta fyri at minkað um tapsvandan og lætta um innkrevjing av meirvirðisgjaldinum. Sum reglurnar eru í dag, ber til hjá persóni, sum hevði verið kravdur eftir trygd, um hann hevði skrásett nýtt virki, at útvega

sær eitt longu skrásett virki, vanliga eitt smápartafelag, uttan at verða kravdur eftir trygd. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum metir, at TAKS – út frá eini ítøkiligari vágameting – eigur at kunna krevja trygd í slíkum føri, og at tað ikki eigur at verða munur á, hvørt ein persónur er stovnari, stjóri ella nevndarlimur í sambandi við skráseting, ella um persónur seinni er við í virkinum. Vandin fyri tapi er júst tann sami. Við hesi broyting fáa persónar, sum brúka "strámenn" ella sum útvega sær eitt longu skrásett virki, ikki tann fyrimun, teir hava í dag.

Mælt verður eisini til at heimila, at TAKS kann strika skrásetingina av ígongdverandi virki, um so er, at krav um trygd ikki verður eftirlíkað. Treytirnar fyri at krevja trygd skulu sjálvsagt verða til staðar í slíkum føri.

Persónlig ábyrgd:

Mælt verður eisini til at áseta (§ 23 b, stk. 11), at persónlig ábyrgd kann gerast galdandi móti leiðslu av virki, sum heldur áfram ella byrjar rakstur, hóast skrásetingin er tikin aftur ella noktað. Leiðslan heftur persónliga, óavmarkað og solidariskt av tí sum stendst av tí ikki skrásetta virkinum. Hetta merkir, at persónur, sum er í leiðsluni, ábyrgdast persónliga við allari sínari ogn, saman við øðrum persónum í leiðslu virkisins. Viðvíkjandi hugtøkunum leiðsla verður víst til serligu viðmerkingarnar til § 1, nr. 3.

Innkrevja skuld o.a. fyrisitingarliga við at afturhalda í A-inntøku

Mælt verður til, at skuld og innkrevjingarkostnaður kunnu verða kravd inn fyrisitingarliga, ístaðin fyri, at TAKS má úttaka stevning móti leiðsluni í hvørjum einstøkum føri.

Revsiábyrgd:

Í § 1, nr. 9 í lógaruppskotinum verður § 33, stk. 3 umorðað soleiðis, at tað eisini er revsivert við grovum ósketni at fremja eitt av teimum í § 33 nevndu brotum fyri at fáa avgjald, sbr. § 24, útgoldið úr landskassanum.

Ummæli
Uppskotið er sent til hoyringar hjá Vinnuhúsinum, Felaginum fyri løggildar granskoðarar og Felaginum fyri skrásettar grannskoðarar.

Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið. Mett verður, at landskassin fær eina meirinntøku av teimum víðkaðu heimildunum.

Uppskotið hevur jaligar umsitingarligar avleiðingar fyri landið. Innheintingin verður einfaldari, um so er, at krøvini kunnu innkrevjast sum onnur krøv, ið TAKS hevur til innkrevjingar.

Uppskotið hevur ikki fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna. Serliga við atliti til, at TAKS fær víðkaðar heimildir at krevja trygd og at strika mvg-skrásetingina av virkjum. Eisini kann TAKS gera persónliga ábyrgd galdandi móti leiðsluni av einum virki, ið heldur áfram ella byrja rakstur av einum virki, hóast skrásetingin er tikin aftur ella noktað. Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

Uppskotið hevur ikki við sær umhvørvisligar avleiðingar.

Uppskotið hevur ikki við sær serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

Uppskotið hevur ikki við sær sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

Uppskotið er ikki tengt at millumtjóða sáttmála.

	Fyri landið/lands-myndugleikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss/øki í landinum	Fyri ávísar sam-felagsbólkar/ felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar	Ja	Nej	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar				Nei	

Kap. 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
Nr. 1
Talan er um eina dagføring av galdandi áseting.

Nr. 2
Í staðin fyri at grunda fyribils ásett avgjald hjá virkinum á eina meting, verður avgjaldið frameftir ásett til meðal avgjald fyri eitt 3 mánaða tíðarskeið. Er einki grundarlag at rokna meðal mvg'ið eftir, tí tað t.d. snýr seg um nýtt virki, ásetur TAKS avgjaldið út frá eini meting.

Nr. 3
Ásett verður, at er eitt virki í 4 samanhangandi tíðarskeiðum fyribilsásett, kann TAKS strika skrásetingina av virkinum. Áðrenn hetta verður gjørt, skal virkið hava fráboðan um, at skrásetingin verður strikað, um so er, at manglandi uppgerðir ikki verða latnar inn innan 14 dagar. Henda fráboðan skal verða givin við innskrivaðum brævi. Fráboðanin skal sendast til leiðslu felagsins ella virkisins. Við leiðslu er at skilja stjórn og nevnd felagsins ella virkisins. Viðvíkjandi kapitalfeløgum verður í hesum sambandi víst til reglurnar í partafelagslógini og smápartafelagslógini um leiðslu felagsins.

Koma uppgerðirnar inn innan hesa freist, kann skrásetingin ikki strikast.

Tað er ein treyt fyri at brúka hesa áseting, at báðar fyribilsásetingar eru framdar aftan á gildiskomuna av hesum uppskoti.

Tað kann koma fyri, at tað ikki er gjørligt at geva virkinum fráboðan um, at ætlanin er at strika skrásetingina av virkinum, av tí at leiðslan er horvin ella at tað á annan hátt ikki er gjørligt at fáa fatur í viðkomandi. Í slíkum førum verður hildið, at TAKS kann strika skrásetingina, hóast fráboðan ikki er framd. Hetta er sjálvsagt treytað av, at TAKS kann sanna, at tað - hóast fleiri royndir - er ógjørligt at fremja fráboðanina. Reglan um fráboðan eigur ikki at kunna forða TAKS í at strika skrásetingina.

Um so er, at virkið er strikað, og virkið seinni letur inn manglandi uppgerðir, kann virkið biðja um at blíva skrásett aftur eftir vanligu reglunum.

Nr. 4
Talan er um eina dagføring av galdandi áseting.

Nr. 5
Tað snýr seg um dagføringar. Strikaðu ásetingarnar viðv. at seta trygd verða fluttar úr § 23 a yvir í nýggju § 23 b.

Nr. 6
Tað snýr seg um dagføringar. Strikaðu ásetingarnar viðv. trygd verða fluttar úr § 23 a yvir í nýggju § 23 b.

Nr. 7
Ásett verður, at TAKS kann áleggja verandi virki at seta trygd, tá virkið ikki heldur krøvini um stytt avgjaldstíðarskeið, ella tá virkið 3 ferðir innan fyri teir seinastu 12 mánaðirnar ikki rættstundis hevur rindað avgjald, og virkið er í eftirstøðu við avgjaldinum eftir MVG-lógini við eini upphædd, ið er meira enn 25.000 kr. tilsamans, og virkið ikki rindar eftirstøðuna áðrenn 10 yrkadagar frá tí, at áminningarskriv frá TAKS er móttikið, har virkið verður kunnað um, at um tað framvegis ikki rindar eftirstøðuna, verður álagt virkinum at seta trygd.

Ásett verður í stk. 2, at TAKS kann áleggja bæði verandi virkjum og virkjum, ið verða fráboðað til skrásetingar, at seta trygd. Krav um trygd kann setast, tá ið eigari av virkinum innanfyri tey seinastu 5 árini hevur verið eigari av ella limur í nevnd ella stjórn í øðrum skrásettum virki, ið er farið konkurs ella er vorðið insolvent, har TAKS hevur krøv, ið ikki eru nóg væl tryggjað, ella landskassin hevur havt 50.000 kr. ella meira tilsamans í tapi av avgjaldi eftir hesi lógini.

Ásett verður somuleiðis í stk. 2, 2. pkt., at TAKS kann áleggja bæði verandi virkjum og virkjum, ið verða fráboðað til skrásetingar, at seta trygd, tá ið tann persónur, sum veruliga rekur virkið, hevur tilknýti til eigara, lim í nevndini ávíkavist stjórnini á sama hátt, sum ásett í § 210, stk. 1, 3. pkt. í vinnufelagslógini, og har tann persónur í veruliga rekur virkið, innanfyri tey seinastu 5 árini hevur verið eigari av ella limur í nevnd ella stjórn í øðrum skrásettum virki, ið er farið konkurs ella er vorðið insolvent, har TAKS hevur krøv, ið ikki eru nóg væl tryggjað, ella landskassin hevur havt 50.000 kr. ella meira tilsamans í tapi av avgjaldi eftir hesi løgtingslóg. Sum dømi um tilfelli, har henda áseting verður aktuel, kann nevnast tann støðan, har tað ið veruleikanum er hjúnafelagin, foreldur ella sambúgvin, ið stendur aftanfyri virkið, og har hesin frammanundan hevur havt eitt annað virki, ið er farið konkurs, og har landskassin hevur mist 50.000 kr. ella meira. Ásetingin er ætlað sum ein forðing fyri, at somu persónar "konkursryttarar" o.t. ferð eftir ferð byrja virksemi uttan at avrokna meirvirðisgjald til landskassan.

Ásett verður í stk. 3, at kravið um trygd bert skal setast, tá ið tað eftir eini ítøkiligari metan hjá TAKS verður mett at vera váði fyri, at kravið um stytt avgjaldstíðarskeið v.m. eftir § 23 a, stk. 1 ella 4 ikki er nóg mikið til at tryggja, at avgjald eftir hesi løgtingslóg verður goldið rættstundis. Sum dømi kann nevnast persónur, ið hevur verið eigari av virki, ið er farið konkurs, og har landskassin hevur havt tap, og har hesin sami persónur gongur aftur í øðrum virki. TAKS kann í slíkum føri áleggja, at trygd verður sett beinanvegin, um gamla virkið ikki hevur hildið sínar skyldur við at lata mvg-uppgerðir rættstundis inn, um gamla virkið í fleiri førum hevur latið inn skeivar mvg-uppgerðir ella gamla virkið ikki hevur hildið gjørdar gjaldsavtalur við TAKS. Tá nýggj virki verða fráboðað til skrásetingar, og teimum verður álagt at seta trygd, kunnu hesi virki ikki skrásetast, fyrr enn kravið um hetta er eftirlíkað.

Ásett verður í stk. 4, at ígongdverandi virki skal seta trygd fyri eini upphædd, ið samsvarar við eftirstøðuna í avgjaldinum eftir hesi løgtingslóg, umframt væntað meðal avgjald fyri eitt 3 mánað tíðarskeið. Snýr tað seg hinvegin um virki, ið verður fráboðað til skrásetingar, skal trygd setast fyri eini upphædd, ið eftir metan frá TAKS samsvarar við tað væntaða miðalavgjaldið í einum 3 mánaða tíðarskeiði.

Ásett verður í stk. 5, at trygdin skal setast seinast 8 dagar aftaná, at virkið hevur móttikið fráboðan um hetta. Freistin kann tó leingjast eftir áheitan. Fráboðanin um, at trygd skal setast, verður send virkinum við innskrivaðum brævi.

Ásett verður í stk. 6, at í fráboðanini við kravi um trygd skal verða sagt frá, at um nevnda trygd ikki verður sett, verður skrásetingin strikað og at framhald av meirvirðisgjaldsskylduga virkseminum aftaná, at skrásetingin er strikað, er revsivert sbrt. § 33, stk. 3 í meirvirðisgjaldslógini, og at leiðslan heftur fyri avgjaldinum, sbr. § 23b, stk. 10 í meirvirðisgjaldslógini.

Ásett verður í stk. 7, at krav um trygd til virki, ið verða fráboðað til skrásetingar, skal fráboðast virkinum og leiðslu seinast 14 dagar aftaná, at TAKS hevur móttikið skrásetingarskjalið. Fráboðanin um trygd skal innihalda upplýsing um, at verður trygdin ikki sett, kann virkið ikki skrásetast, og at framhald av virkinum er revsivert, sbrt. § 33, stk. 3 í meirvirðisgjaldslógini, og at leiðslan heftur persónliga fyri avgjaldinum, sbr. stk. 10.

Ásett verður í stk. 8, at verður trygd ikki sett rættstundis av verandi virki, verður skrásetingin tikin frá virkinum. Verður trygd ikki sett av virki, ið er fráboðað til skrásetingar, verður virkið ikki skrásett.

Ásett verður í stk. 9, at fráboðanin um, at skrásetingin er tikin aftur ella noktað, skal sendast virkinum og leiðslu við innskrivaðum brævi, og samstundis skal sagt verða frá, at framhald av virkinum aftaná, at skráseting er tikin aftur ella noktað, er revsivert, og at leiðsla felagsins heftur persónliga fyri avgjaldinum.

Ásett verður í stk. 10, at leiðslan av einum virki, ið við vilja ella av grovum ósketni heldur áfram ella byrjar rakstur av einum virki, hóast skrásetingin er tikin aftur ella noktað, heftur persónliga fyri avgjaldinum, sum stendst av tí ikki skrásetta virkinum. Heftilsi er persónligt, óavmarkað og solidariskt. Hetta merkir, at persónur, sum er í leiðsluni ábyrgdast persónliga við allari sínari ogn, saman við øðrum persónum í leiðslu virkisins. Viðvíkjandi hugtakinum leiðsla verður víst til serligu viðmerkingar til § 1, nr. 3.

Ásett verður í stk. 11, at trygd, sum er sett sbrt. stk. 1 og 2, heldur uppat, tá ið virkið í tí seinasta 12 mánaða tíðarskeiðinum hevur goldið avgjald eftir hesi løgtingslóg rættstundis og virkið ikki longur er í eftirstøðu.

Nr. 8
Við hesi áseting verður heimilað TAKS at innkrevja eftirstøður av meirvirðisgjaldi saman við innkrevjingarkostnaði við útpantning við at seta eykatrekk inn á skattin. Eykatrekkið skal viðgerast eftir reglunum í skattalógini.

Nr. 9
Ásetingin er umorðað soleiðis, at 1. pkt. í § 33, stk. 3 nú eisini fevnir um brot, framd við grovum ósketni.

Til § 2.
Áseting um gildiskomu.

Viðløgd skjøl

Skjal 1: Viðmerkingar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag, dagfest 8. februar 2011
Skjal 2: Viðmerkingar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag, dagfest 23. mars 2011
Skjal 3: Viðmerkingar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag, dagfest 21. august 2011
Skjal 4: Viðmerkingar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag, dagfest 17. februar 2012

Fíggjarmálaráðið, 29. februar 2012

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

/Atli Suni Leo